# Kvinnur í politikki – ein uppgáva hjá veljarafeløgunum

ANNFINN BREKKSTEIN
formaður í Føroya Val



Veljarafeløgini mugu síggja til at sama tal á kvinnum og monnum á valevnislistunum kring landið til komandi val. Tað er einasti demokratiski háttur, ið tryggjar, at fleiri kvinnur koma framat í politikki.
Skulu vit koma nærri alheimsgerðini, globaliseringini og Visjón 2015, eiga vit at fáa fleiri kvinnur á komandi valevnislistar kring landið. Harvið skuldi møguleikin verið størri at fingið fleiri kvinnur valdar. Kvinnurnar eru í dag undirumboðaðar í løgtinginum, men ørsøkirnar eru fleiri, og tað kunna vit blíva við at kjakast um. Men hyggja vit frameftir til komandi løgtingsval, kunnu vit byrja við uppstillingini og seta okkum sum mál, at tað vera líka nógvar kvinnur sum menn á valevnislistum.
Tað er mín sannføring, at um talið á kvinnum og monnum er eins nógv á komandi valevnislistunum, verða fleiri kvinnur valdar á ting og vit fáa eitt javnari býti millum kynini. Um vit náa helvtarbýtinum til komandi val er ivasamt, men møguleikin er nógv størri til valið 2012, um hetta verður málsetningurin longu til komandi val.
Men høvuðsábyrgdin liggur hjá kvinnunum sjálvum, tí tær mugu verða meira sjónligar úti í veljarafeløgunum, lata við seg koma, geva seg til kennar og luttaka aktivt, og ikki bara verða settar á listarnar hjá flokkunum, »fyri at hava tær við«.
Hetta skal ikki misskiljast, men eg kann bert staðfesta hetta frá mínum egna veljarafelag. Hinvegin havi eg eisini varðhugan av, at so er í allarflestu veljarafeløgum og flokkum kring landið. Men eg skal eisini taka í egna barm og viðganga, at veljarafeløgini og flokkarnir hava ikki havt tær røttu dagskráirnar, sum viðkoma kvinnum, og hetta er allarhelst viðvirkandi til, at tær eisini her eru undirumboðaðar.
Tað hava verið nógv tiltøk, fundir og fyrilestrar um umboðanina hjá kvinnum í býráðum, bygdarráðum og politikki sum heild, og harvið er »banin kritaður upp« og eftir stendur so hjá okkum, sum eru vald í veljarafeløgini, at manna liðið við líka nógvum av báðum kynum. Restin stendur so til ta demokratisku skipanina.
Sjálvur taki eg ikki undir við, at lóggivið verður fyri kynsbýtinum.

# Trúboðin er ikki partapolitiskur

FRANTS JENSEN
blaðstjóri



Í lesarabrævi í bløðunum í gjár skuldsetir Tórbjørn Jacobsen, løgtingsmaður, blaðið Trúboðan millum annað at vera dømandi, partapolitiskt, at lata seg prostituera og at føra propaganda. Hetta í sambandi við samrøðu, ið blaðið hevði við Alfred Olsen, løgtingsmann, fyrr í vikuni.
Eg vil greitt afturvísa øll um ákærunum. Tann gløggi lesarin dugir helst skjótt at síggja, at ikki kann vera nógv hald í skuldsetingunum, tí sjálvt yvirskriftin á greinini "Ikki fyrimunur at vera reinur kristiligur flokkur" ber boð um, at Trúboðin ikki er partapolitiskur. Trúboðin er heldur ikki nakað annað av tí, sum skuldsetingarnar ljóða uppá. Tann, ið ikki kennir blaðið frammanundan, kann lesa tað og fáa sjón fyri søgn.

# Samband um Skálafjørðin

SONNI JOHANSEN
490 Strendur

Nú nærkast dagurin at tunnilsbólkurin skal leggja álit fram um farleið um fjørðin og suður á Streymoynna.
Hvussu sambandið um fjørðin verður er ein sera týðandi partur, og eftir míni meting er hettar eitt avgerandi punkt í hesum tíðum har samanlegging er nógv frammi. Ja onkur hevur hug at leggja saman, ja bert fyri at leggja saman, uttan so mikið sum at vekta fordeilir og vansar, bert vera stórir tað er nokk, nei líka myki hvat vit gera her á fjørðinum vera vit ikki nøkur stór kommuna, og skulu vit vera tað??
Ja hvønn veg skal Sjóvar kommuna fara??
Tá tunnilin er komin suður til Tórshavnar kommunu eru enn fleiri møguleikar opnir, fyri samanlegging av kommunum.
Um sambandi um fjørðin ikki veður so stutt sum gjørligt og so brúkaravinarlig sum til ber, so er tankin við at fjørðurin verður ein eind eitt sindur fjarari.
At sambandi um fjørðin verður so gott sum gjørligt, at sjálvt teir ynsktu bogararnir eisini kunnu ferðast trygt má vera ein treyt, um hugsa verður um framtíðina. Skulu vit ikki menna skúlaøkið.
Mentan ja alt samband sum er innan kommunumark og langt út um eisini.
Eg vóni tit hava slept hesum einsporaða tonkum og bert start tykkum blindar av at holi skal upp í kjallaranum hjá tykkum á eystara armi, um so er, er bert at bora beint í toftavatn , so er tann perlan eisini strika av kortinum.
Nei lati okkum fáa eitt sambandi um fjørðin so piltarnir kunnu vitja hvønn annan á hjólheystið, ommurnar kunnu spáka sær ein túr yvir um fjørðin at vitja ommubørnini, hettar er ikki bert hugna tankar, men ramasta álvara, tankarnir við boritorn og supertankarum inni í Skálabotni er heilaspuni úr øðrum enda í annan, um hesi risaskip skulu inn á fjørðin, má ein djúphavn gerast longur úti á fjørðinum.
Tá eg bleiv valdur í Sjóvar bygdaráð helt eg tað vera eina natúrliga gongd at Skálafjørðurin bleiv ein kommuna, tað var nógv sum talaði fyri tíð,tí tað vóru nógvar uppgávur sum landi ætlaði at leggja út á kommunurnar, ja nakrar stórar og tungar ætlanir, men hvat er hent, okkurt er skrumblað ígjøgnum og eingin peningur fylgir við, eldraøki er lagt á ís tí landsstýrismaðurin sær út sum hann ikki grynnur í løtuni.
Tað samarbeiði vit hava við grannakommununa kundi bert veðri betur, ja nógv betur, Veðrur hugt aftur um bak eftir tunnilsætlanina er ikki nógv at síggja til samarbeiði og framtíðar ætlanir,hvørki hvat tænir landsins besta og ei heldur grannunum á vestaraarmi, so her skulu heilt aðrir bollar í súpanina, um eitt samarbeiði ella møguliga samanlegging skal vera veruleiki um 10 til 15 ár.

## Náttúrunnar syklus

Vindurin togar nú aftur í greinarnar
nær við at blása burt smásteinarnar
soleiðis kann vindur vera ímóti trøunum
men treisk hava gott tamarhald á bløðunum

Men tá ið tað líður ímóti heysti
hava tey kortini á bløðunum mist festið
frá at vera grøn til gul ella brún
rekast tey nú aftur um geilar og tún

Børkur øll trø hevur í vetur vart
í regni kulda tá ið veðrið var hart
líka umráðandi sum klædningur á veggi
ella um tú vilt skalið á einum eggi

Nú so berar upp í luft peika greinar
hendinga fuglur uppiyvir leikandi sveimar
hatta var tað sum trøini høvdu at bjóða í ár
lætta har ta sól luftløgini nú brádliga vár

Um tað mundið børnini fara út aftur at spæla
tykist grønka á fjøllum og farið at nala
ber berligheit burtur aftur vaksa gomul strá
er kerligheit turkur lætnar vaksna gloymda trá

Nú stendur alt í fagrasta blóma
prýðkar bæði bygd og bý til miklan sóma
fuglar aftur kunna reiðrast uppi á grein
nærkask nú summar heiðrast skal teirra heim

Niðri í jørðini røturnar hava havt nógva saft
fyri at klára veturin og várið við nýggjari kraft
staðið hava leingi í nógvari sevju og tøð
burtur komin úr evju og bera aftur bløð

Summar vælafturkomið tú vera skalt
nýggju mánaðir síðani síðst mangan var kalt
við lívgandi sól og summar hita
ofta vár longsul úti aftur kunna at sita

Sita við vikublaðnum og lesa blaðgreinarnar
aftaná vind og teir fuknu smásteinarnar
ella hava eyguni vend á greinarnar við blaði
ið nú veksur aftur á hvørjum einasta træi

Óla Jákup Thomsen

Eitt baldrutt vikuskifti

Petur Skeel gevur sína forsøgn uppá veðrið um vikuskiftið

VEÐRIÐ
Heini S. Kristiansen
heinik@sosialurin.fo

Eitt djúpt látrýst fer framvið Føroyum eystanfyri leygarkvøldið og sunnunáttina. Tað gevur nógvan vind, kanska storm eitt skifti av landnyrðingi, seinni av útnyrðingi. Tað verður eisini regn um vikuskiftið. Sunnudag seinnapartin kann væntast gott veður og sólin kemur framm. Sunnukvøldið verður aftur vindur av landsyningi og mánadagin regn. Týsdagin verður lágætt, og tað verður lýtt.
Petur væntar ikki, at tað fer at kava um vikuskifti. Ei heldur kunnu vit vænta hálku á vegnum. Men nógv regn og nógvur vindur.

